## Norður um Fjall fyrst



Í raðfestingunum hjá Landsverk yvir íløgur, stendur tunnilin norður um Fjall ovast. – Tað er eisini samtykt, at allir tunlar skulu fáa neyðugu ábøturnar, so teir lúka ásettu krøvini. Men tað ber stutt sagt ikki til at gera nakrar ábøtur á tunlarnar norður um Fjall. Tú fært til dømis ikki sett ljós upp í tunlunum, tí teir eru ov lágir. Tunlarnir eru vandamiklir bæði fyri trygdina og ferðsluna, og als ikki tíðarhóskandi, sigur Anfinn Kalsberg. Um peningur verður settur av til tunnil norður um Fjall er kortini ikki greitt enn.

## Rætt at býta sundur

Tað var skeivt at leggja heilsumál og almannamál saman í sínari tíð. At ein einstakur landsstýrismaður umsitur meiri enn helmingin av fíggjarlógini hongur slett ikki saman. Arbeiðsuppgávan er eisini alt ov stór og ein landsstýrismaður við báðum málsøkjunum fær ikki eitt bein til jørðina, sigur Karsten Hansen. Hann metir ikki, at tað fer at kosta nakað meira at býta málsøkini sundur, tí fólkini fylgdu við, tá økini í sínari tíð vórðu løgd saman.

# Helst ikki drúgv viðgerð

**Fyrsta viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum plagar at røkka yvir fleiri dagar, men Anfinn Kalsberg, fíggjarnevndarformaður, væntar ikki, at viðgerðin hesaferð verður serliga drúgv. – Uppskotið er als ikki viðgjørt politiskt, sigur hann**

FÍGGJARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Av tí politiska rumbli, sum hevur verið í sambandi við uppsøgn av samgongu og samráðingum um nýtt landsstýri, var tað ein av embætisfólkunum framskrivað fíggjarlóg, sum Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, hevur lagt fyri løgtingið.

- Har eru ongar politiskar prioriteringar í uppskotinum, og ongar íløgur, sum ikki eru bundnar framman undan, sigur Anfinn Kalsberg, fíggjarnevndarformaður.

Tað merkir, at íløgurnar í uppskotinum bert eru 145 milliónir krónur, í mun til tær umleið 300, sum vanliga eru á fíggjarlógini.

Rakstrarútreiðslurnar eru hinvegin vaksnar við risafetum.

- Vit høvdu eitt uppskot til fíggjarlógar uppskotið hjá CHE samgonguni um at minka rakstrarútreiðslurnar við 80 milliónum fyri árið í ár, men tað fekst ikki ljóð fyri tí. Rakstrarútreiðslurnar vuksu frá 2007 til 08 við góðum 300 milliónum, og tær vaksa eftir hesum uppskotinum við 340 milliónum frá 2008 til 09, sigur Anfinn Kalsberg.

Hann vísir á, at tað ber ikki til at hava undirskot á fíggjarlógini ár um ár, men sigur samstundis, at tað er neyvan realistiskt, at vænta javnvág á fíggjarlógini fyri komandi ár.

- Fyriliggjandi uppskot vísir eitt hall upp á 244 milliónir krónur, og hallið verður neyvan minni, tá uppskotið er politiskt viðgjørt, heldur størri, metir Anfinn Kalsberg.



*Tað gevur onga meining at viðgera hetta uppskotið í verandi líki, og tí fari eg at heita á tingið um at taka ta gjølligu viðgerðina við aðru viðgerð, segði Afinn Kalsberg á tingsins røðarapalli við fyrstu viðgerð í morgun*

### Verður hektiskt

Vanliga verður fíggjarlógaruppskotið lagt fyri tingið 1. oktober, men tað er eftir, at tað hevur fingið eina gjølliga viðgerð í bæði landsstýri og samgongu. Hetta arbeiðið er so ikki gjørt í sambandi við hetta uppskotið, og tí má tað gerast nú, eftir at framskrivaða fíggjarlógar uppskotið er lagt fram.

- Tað gevur næstan onga meining at viðgerða hetta uppskotið, áðrenn tað hevur fingið neyðugu politisku viðgerðina, og áðrenn politisku raðfestingarnar eru gjørdar. Tí vænti eg heldur ikki, at tað verður tað heilt stóra kjakið við hesa fyrstu viðgerðina uttan so, at onkur tinglimur kennir eina trongd at viðgera okkurt ávíst mál, sigur Anfinn Kalsberg.

Eftir fyrstu viðgerð verður uppskotið sent í fíggjarnevndina, men ymsu ráðini skulu eisini gera sínar ætlanir fyri komandi ár og seta síni ynski fram til fíggjarlógina.

- So tað er greitt, at arbeiðið við fíggjarlógini verður hektiskt, tá tað líður eitt sindur meiri út, sigur Anfinn Kalsberg.

# Mugu seta serfrøðingabólkar

**Í framløgurøðu síni mælti Magni Laksáfoss til at seta fimm serfrøðingabólkar at útgreina vandaøkir innan bólkarnar. Somuleiðis verður neyðugt við einari nýggjari ES-strategi**

FÍGGJARLÓG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Eg trúgvi ikki, at ES er eitt himmiríki at fara inn í, men tað er eitt helviti at standa uttan fyri!

So bersøgin var Magni Laksáfoss undir fyrstu viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum í morgun.

Hann segði, at tað verður neyðugt at kanna, hvussu vit uppnáa tey undantøkini, sum skulu til, fyri at vit kunnu fara inn í ES. Og har hugsaði hann serliga um fiskivinnuna.



*Magni Laksáfoss var rættiliga bersøgin, tá hann umrøddi ES-politikkin í sambandi við fyrstu viðgerð av fíggjarlógini í morgun*

- Tað er neyðugt við einum nýggjum Europa-politikki, einari nýggjari ES-strategi. Vit mugu ikki lata misskiltar tjóðskaparkenslur forða fyri, at vit nærkast ES, segði Magni Laksáfoss.

Hann vísti á, at vit í dag hava ein positivan útflutningsprofil mótvegis ES. Tað merkir, at vit bert kunnu útflyta vørur til ES, sum positivt eru navndar á listanum.

- Og tað er har, vit skulu fáa latið upp fyri nýggjum møguleikum og nýggjum framleiðslum, segði Magni Laksáfoss.

### Serfrøðingabólkar

Hann metti tað eisini verða neyðugt, at taka málið um høgu oljuprísirnar upp.

- Fíggjarkreppan ger, at eftirspurningurin eftir olju er minkaður, og tí sæst ein lítil lækking í oljuprísunum í løtuni. Men tá fíggjarkreppan er av um eitt ár ella so, veksur eftirspurningurin aftur við fylgjandi hækkandi oljuprísum. Og tí er neyðugt at finna alternativar orkukeldur sum skjótast, segði Magni Laksáfoss og nevndi enska hugtakið »We must leave the oil, before the oil leaves us«.

Sum alternativar orkukeldur nevndi hann vindorku, sólorku og alduorku, og í tí sambandi vísti Bjarni Djurholm, fyrrverandi landsstýrismaður við orkumálum, at undir undanfarnu ABC samgongu varð orðaður ein orkupolitikkur, har fleiri alternativ vórðu nevnd, harav summi kundu setast í verk frá degi til dags.

Tað verður eisini neyðugt at seta serfrøðingabólkar at kanna vandaøkini innan fimm bólklar: fíggjarkervið, fiskivinuna, vinnur á landi, almenna geiran og privatu húsarhaldini.

- Vit mugu fáa hesar serfrøðingabólkar at kanna, hvar vandaøkini eru, og hvørjum vit skulu taka hædd fyri, segði Magni Laksáfoss.